ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Eg fati ikki, at okkara flogskiparar ikki sóu tað stóra flogfarið*
*(amerikanskur ferðamaður)*

# Sóu ikki tað stóra flogfarið



**Flogskipararnir á tí lítla privatflogfarinum varnaðust ikki tað stóra ferðamannaflogfarið, fyrr enn ov seint var**

Teir báðir flogskipararnir á tí lítla privatflogfarinum fata ikki, hvussu flogfar teirra kann hava borið við eitt stórt ferðamannaflogfar, uttan at teir varnaðust vandan. Men myndugleikarnir eru ikki í iva.

- Vit hava staðfest, at tey bæði flogførini stoyttu saman, sigur ovastin fyri sivilu flogferðsluni í Brasil, Denise Abreu.

Tað var fríggjadagin, at tey bæði flogførini sambært myndugleikunum bóru saman uppi yvir Amazonas-skóginum. Tað stóra Boeing 737-flogfarið datt niður beinanvegin, og øll tey 155, sum vóru í flogfarinum, doyðu. Flogfarið var spildurnýtt. Tað eru bara góðar tvær vikur, síðani tað fór av verksmiðjuni í USA.

Teir báðir flogskipararnir og tey sjey ferðafólkini, sum vóru í tí lítla flogfarinum, sita spyrjandi eftir.

- Eg fati ikki, hvussu vit kundu sleppa livandi frá einum samanstoyti uppi í luftini, og eg dugi heldur ikki at skilja, hvussu flogførini kundu bera saman, uttan at okkara flogskiparar varnaðust vandan, sigur amerikanski tíðindamaðurin Joe Sharkley, sum var við tí lítla flogfarinum, ið neyðlendi í øllum.

# Brúgvin datt niður

**Fimm fólk doyðu, tá ein motorvegbrúgv hoyknaði uttan fyri Montreal leygarkvøldið**

Fleiri bilførarar fingu ikki stundir at steðga, tá ein partur av einari motorvegbrúgv millum kanadiska býin Montreal og forstaðin Laval datt niður.

Fimm fólk vóru í tveimum bilum, sum hvurvu undir tí partinum av brúnni, sum datt niður. Tey eru uttan iva deyð beinanvegin, tí tá bjargingarmenninir sluppu fram at bilunum 15 tímar eftir vanlukkuna, vóru bilarnir kroystir næstan flatir undir teimum stóru betongstykkjunum. Tey, sum vóru í hinum bilunum, sum fóru útav, vóru hepnari, men seks teirra máttu á sjúkrahús.

Sjónvarpsstøðin LCN visti at siga, at fleiri fólk høvdu ringt til løgrergluna, áðrenn vanlukkan hendi, tí tey hildu seg hava sæð, at rivur vóru komnar í vegin á brúnni.

Hetta er onnur vanlukkan av hesum slagnum á motorvegnum við Montreal. Fyri fimm árum síðani hoyknaði ein brúgv við forstaðin Laval, og ta ferðina doyði eitt fólk, og tvey fingu skaða.



*Tey, sum vóru í hesum bilunum, vóru heppin.*

## Funnin myrd í kirkjuni

Tann 23 ára gamla Angelika Kluk úr Pólandi var í Skotlandi og lærdi seg enskt. Um vikuskiftið varð hon funnin myrd í einari kirkju.

Fyri at forvinna sær pening til málskeiðið hevði Angelika Kluk fingið sær arbeiði sum vaksikona í einari kirkju í Glasgow. Men seinasta mánadag kom hon ikki til arbeiðis, og systirin, sum býr í býnum, fekk løgregluna at fara at leita eftir henni.

Leitingin gav einki úrslit, men so kom fram, at Angelika Kluk varð seinast sædd saman við einum 60 ára gomlum manni, sum æt Pat MacLaughlin. Hann arbeiddi í somu kirkju sum Agelika, men hann kom heldur ikki til arbeiðis í síðstu viku.

Løgreglan avdúkaði skjótt, at Pat MacLaughlin æt í veruleikanum Peter Tobin, sum hevði sitið í fongsli í fleiri ár fyri neyðtøku, og løgreglan fekk illgruna um, at okkurt álvarssamt kundi vera hent polsku kvinnuni.

So var. Í gjár varð hon funnin myrd í kirkjuni, har hon arbeiddi. Samstundis bleiv Peter Tobin funnin í London og handtikin. Ætlandi verður hann fluttur til Glasgow til avhoyringar í dag.